

## Bilradio hósdagin kl. 17.15

**Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.15 fortelur Agnar Dahl (myndin) frá áhugafelagnum Føroya MC um føroyameistarakappingina í ATV & Cross. Eisini fortelur Ronny í Lon um sín áhuga fyri speedway og um speedwaykappingar úti í heimi. Endursending verður av eini samrøða við Hans Madsen í Kollafirði um hydrogengeneratorar.**

# g inn í Tesla





*Guvernørurin í California, Arnold Schwarzenegger, saman við Toyota presidentinum Akio Toyoda og Elon Musk, stjóra í Tesla Motors*




*Elon Musk stjóri í Tesla Motors og Toyota presidenturin Akio Toyoda*

Nógv varð gjørt burturúr í býnum Fremont, nærhendis San Francisco, tá Toyota almannakunngjørdu, at teir hava keypt seg inn í Tesla Motors, sum hava spesialiserað seg í at framleiða nakrar av kvikastu og mest framkomnu elbilum í øllum heiminum.

Guvernørurin í California, Arnold Schwarzenegger, luttók í hátíðarhaldinum og kundi gleðast um, at avtalan kemur at hava við sær yvir 1000 nýggj arbeiðspláss.

Ætlanin er at Tesla og Toyota m.a. skulu samstarva um sonevndar Minivan og Crossover í el-útgávum.



*Renault Clio við høgra forsetri sum kann snarast*

# Renault við swing-setri

**Renault gera tað nú lættari koma inn og úr smáum bilum.**

**Sum eykaútgerð til Renault Clio fæst nú høgra forsetur, sum kann snarast soleiðis, at lætt er at koma inn og úr bilinum. Sambært Renault er trygdin tann sama sum í Clio við "føstum" forsetri.**

**Eitt slíkt setur kann vera hent hjá teimum, sum hava trupulleikar við at koma inn og úr vanligum bilum. Í fyrstu atløgu fæst setrið einans sum eykaútgerð til Renault Clio í Fraklandi og nøkrum øðrum evropeiskum londum.**




# Alvis koma aftur

Fyritøkan, sum hevur útvegað eykalutir og tænastu til ensku Alvis bilarnir seinastu 40 árini, hevur nú ætlanir um at koma á marknaðin við einum nýggjum Alvis.

Red Triangle er ein fyritøka í Onglandi, sum hevur útvegað eykalutir og tænastu til ensku Alvis bilarnar, síðan framleiðslan steðgaði í 1967. Red Triangle hevur nú ætlanir um at byrja framleiðslu av einum nýggjum Alvis.

Alvis vórðu gjørdir á verksmiðjuni Alvis Car and Engineering Company Ltd of Coventry í Onglandi frá 1920. Eftir at Alvis verksmiðjan í 1965 varð løgd saman við Rover, steðgaði framleiðslan av Alvis bilum í 1967. Framleiddir vórðu tilsamans 22.000 Alvis bilar.

*Alvis vóru enskir luksusbilar. Hesin Alvis Cabriolet er frá 1967*